**Føðingar**



Fríggjadagin 30. november fingu Sirið, Rebekka og Teresa eina lítlasystur. Hon vigaði 3380 gr. og var 52 cm long. Foreldrini eru Kristin og Johannes Magnussen, Tvøroyri

26. november fingu Maria Thorgeirsson og Hanus Lind Sørensen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4200 gr.

27. november fingu Rigmor og John Fonsdal, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4650 gr.

28. november fingu Anna Eiriksdóttir Simonsen og John Kári Midjord, Argir, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3450 gr.

28. november fingu Heidi og Jan Heinesen, Norðragøta, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4000 gr.

30. november fingu Beinta Olsen og Jónhard Joensen, Streymnes, ein son. Hann var 55,5 cm. langur og vigaði 3900 gr.

1. desember fingu Maibritt Olsen, Toftir og Jónreid Dalheim, Norðragøta, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3250 gr.

2. desember fingu Karin Andreasen og Bogi í Dali, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4150 gr.

3. desember fingu Anita Heinesen og Gerhard Hølck Hansen, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3850 gr.

Laila av Reyni og Göran Wennerström, Tórshavn, hava fingið eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3150 gr.



26. nov. 2007 fingu Jeanette Danielsen og Torleif Johansen, Aalborg eina dóttir. Hon vigaði 4080 gr og var 54 cm long

**70 ára føðingardagur**
5. desembur fylti Marius Vang, Leirvík 70 ár. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Leirvík, leygardagin 8. desembur frá kl. 18.

**75 ár**
Mánadagin 10. desember fyllir Vilhelmina Johansen, 75 ár. Dagurin verður hildin heima hjá Hildigarð og Kristian, Reynsgøta 6, sunnudagin 9. desember aftaná kl. 18.

**90 ár**
Í dag, 7. desember verður Hilma Dam Jacobsen, Kollafjørður, 90 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**95 ár**
Leygardagin 8. desember verður Rosa Petersen, Klaksvík, 95 ár. Dagurin verður hildin í Saron á Viðareiði, frá kl. 16. Øll eru hjartaliga vælkomin.

# Magnus Hansen 50 ár



Sunnudagin 2. desember fylti Magnus Hansen arkitektur í Havn 50 ár.

Magnus er havnarmaður við stórum H. Foreldrini eru: Margreta, f. Thomsen úr Norðragøtu, og Arnold Hansen, vanliga nevndur Alli úr Havn. Fyrstu árini búði familjan í Sjúrðargøtu, til tey í 1969 fluttu niðan í Gundadal.

Uppvaksin í einum B36 umhvørvi har pápin spældi við B36 og var formaður í felagnum í næstan 30 ár, er Magnus er eisini íðin B36 viðhaldsmaður. Magnus hevur eisini sungið nógv í Tórshavnar Manskóri.

Magnus hevur drúgvar royndir sum arkitektur bæði í almennu og privatu vinnuni. Tað vakti ans, tá hann herfyri setti Nólsoy á heimskortið við at koma við einum uppskoti um altjóða floghavn har.

Magnus eigur fýra døtur: Margreta, Aimée, Birna og Andrea. Kona Magnus er Edith Dahl.

# 100 ára hald í Porkeri



*Betania í dag*



*Uttan fyri salin í 1987*

Í ár eru 100 ár liðin, síðan fyrsti salur hjá brøðrasamkomuni í Porkeri var bygdur, og verða í hesum sambandi tvey møtir í Betania í Porkeri nú sunnudagin. - Kl. 15.30 verður søgan hjá samkomuni lýst við myndum. Og, seinni um kvøldið, kl. 20.00 verður møti, við m. ø. luttøku av Suðuroyarkórinum.

Árið fyri, sum salurin var bygdur, mánaskiftið januar/februar í 1906, vitjaðu Napoleon í Dali og Jóan Pauli við Neyst í Porkeri. Teir hildu møtir í skúlanum og komu fleiri til umvending, m.o. virkandi deknurin, Kristoffer Larsen og fleiri familjur í bygdini.

Seinni sama ár vitjar Brend í Suðuroynni og er hann eisini til møtir her í Porkeri. Árið eftir kemur missioner Danielsen eisini til Porkeris og hevur møtir, og vit síggja, at fleiri leggjast aftur at og verða doypt. Staðið, har dópurin fór fram var vesturi í dalinum, í gamla svimjihyli.

Martin Nielsen av Vatnsoyrum, vanliga nevndur stóri Martin, var eisini her suðuri í sambandi við, at telefon var løgd millum bygdirnar. Hann hevði eisini møtir her í bygdini – í einum pakkhúsi, og var tað til signing fyri fólk her.

Í fyrra helmingi av 1907 var so farið undir at byggja sal, sum fekk navnið Betania. Um heystið í 1907 stóð hann liðugur mitt í Skemmutúninum, har sum grastrýkanturin er í dag. Hesin salur hevði flata tekju.

Mynd var tikin av Porkeri sama heystið, og sæst salurin á henni. Myndina tók Arthur Brend í sambandi við, at hann var til møtir í bygdini og eisini gjørdi handilstenn til fólk. Hann tók eisini eina mynd uttanfyri av fólki, ið var á møti hendan sama sunnudagin.

Møtir vóru sunnudag og tórsdag, sum hava hildið fram heilt til dagin í dag. Sunnumorgun var breyðbróting. Síðan seinni um dagin var sunnudagsskúli og um kvøldið evangeliskt møti. Tórskvøld var bønarmøti.

Sum árini ganga, leggjast fleiri aftur at samkomuni, og í 1921 var nýggjur salur bygdur á sama stað sum tann fyrsti. Hesin hevði høga reising og tók meiri fólk.

Í 1970 bleiv vegurin breiðkaður gjøgnum bygdina, og var avgjørt at taka salin niður, av tí, at hann stóð so illa fyri. Grundøki var so fingið til nýggjan sal, og var hetta ikki so langt frá staðnum, har hinir høvdu staðið. So var farið í gongd við at byggja. Meðan hetta fór fram, vóru møtini hildin í húsinum hjá arbeiðsmannafelagnum, í Samvirkinum.

Í 1975 stóð so triðji salurin liðugur og var hann tikin í nýtslu mánaskiftið mai/juni. Hesin núverandi salurin er væl størri enn hinir fyrru. Umleið 100 fólk kunnu verða í sjálvum salinum. eisini er loft, sum tekur nakað av fólki og er kjallarin eisini innrættaður við einum minni sali og køki.



*Uttan fyri salin í 1907*

Regluligu møtini í dag eru: Sunnumorgun kl. 11.00 familjumøti. kl. 11.45 breyðbróting í salinum í erva og sunnudagsskúli í salinum í neðra. Tórskvøld kl. 20.00 bønarmøti.